# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein




## RENNA Á KALSOYNNI

Tey byrja á ferjuleguni á Syðradali har suðuri á Kalsoynni og enda í túninum í Trøllanesi har norðuri. Árlia Kalsoyarrenningin verður leygardagin. Í fjør vóru umleið 130 luttakarar við, og roknað verður við minst líka stórari undirtøku hesaferð. Teinurin, sum runnið verður, er 16,5 kilometrar. Treysti skipar fyri, og tey taka eisini ímóti tilmeldingum.

**KALSOYARRENNNINGIN**
Kalsoy leygardagin 18/9 kl. 10.00



## DRÁPSMAÐURIN

Filmurin The Killer Inside Me snýr seg um tann sjarmerandi Loy Ford og lítla býin í Texas, har hann er sheriffur. Lou hevur trupulleikar við kvinnum, arbeiði og veruleikanum, at hann er drápsmaður. Við tíðini verður illgrunin um dráp í býnum vendur ímóti honum, men einki er heilt, sum tað eigur at verða í býnum.

**THE KILLER INSIDE ME**
Biograffilmur
Fríggjadagin 16/9-



## HERGERÐ Í SMIÐJUNI

Í dag letur framsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík í Havn. Tað er Hergerð Joensen, sum hevur sína árligu framsýning har. Framsýningin er opin fram til týsdagin.

**HERGERÐ JOENSEN**
Smiðjan í Lítluvík
Fríggjadagin 17/9 kl. 16.00-




## RISARNIR BRESTA SAMAN

Sunnudagin hittast sigursvandu fótbóltsfeløgini Manchester United og Liverpool í stórdysti í ensku Premier League. Hvørki av liðunum hevur fingið bestu byrjanina í ensku landskappingini, og tí stendur nógv upp á spæl á Old Trafford sunnudagin.

**MAN UNITED-LIVERPOOL**
Premier League
6'arin sunnudagin 19/9
kl. 13.30



## SYNGJA SAMA LAG

Tey eru ikki ókend á føroyska tónleikapallinum og hava framført bæði saman og hvør sær. Noê Chaparro er 27 ára gamal, ættaður úr Puerto Rico, er giftur við Barbaru og hevur búð her seinastu níggju mánaðirnar. Barbara Chaparro er tann yngsa av Carlsen systrunum, sum hava havt bólk saman. Leygarkvøldið spæla Noé og Barbara saman á Kafe Kaspar í Havn.

**NOÊ & BARBARA**
Kafe Kaspar í Havn
Leygarkvøldið 18/9 kl. 23.00



## TEQUILA OG TATO-VERINGAR

Í meira enn 25 ár hevur hann verið sangari í rockbólkinum Motley Crue og í egnum bólki. Og hann hevur livað rock n roll lívið sum fáur. Nú sigur Vince Neil søguna um sína tónleikakarrieru og privatlív, og tað er ein søga, sum inniheldur bæði eitt og annað.

**VINCE NEIL**
Tatoos and Tequilas
Orion 16/9

## FRAMRÁS Í FÝRA DAGAR

Hesar dagarnar verður tónleikatiltakið FramRás hildið í høvuðsstaðnum. Fyrsta konsertin var í gjárkvøldið, og hildið verður fram til sunnudagin. Tað eru fremstu bólkar innan klassiskan tónleik í Føroyum, ið standa fyri tiltakinum.

**FRAMRÁS**
Norðurlandahúsið og Listaskálin
Hósdagin 16/9-Sunnudagin 19/9